
Mynd: Jens Kristian Vang

**RÓGVI NIELSEN, SALTANGARÁ:**
-Eg fari› í tivoli og kanska fari› eg at sparka vi› A-li›num hjá smádreingjunum hjá NSÍ. Vit fáa hei›ursmerki, um vit so vinna ella tapa. Annars fari› eg at keypa mær okkurt og seta meg heima at hyggja eftir sjónvarpi. Eg eri spentur um eg fari at vinna okkurt í tivoli.

# Koyri› á...

*SÚKKLUKAPPING. Tveir dreingir í Glyvra Skúla fara at gera sítt ítarsta til tess at vinna súkklukappingina fyri børn á Eystanstevnu*

Høgni Mohr

Teir ætla sær at buka burtur úr hinum súkklarunum.

Undir øllum umstø›um fara teir at tra›ka ta›, teir eru mentir.

Brian Jacobsen og Símun Jóhann Samuelsen ganga bá›ir í fimta flokki í Glyvra Skúla, og tá i› Sosialurin kunna›i teir um súkklukappingina, sum ver›ur á Eystanstevnu, avgjørdu teir alt fyri eitt, at teir fóru at luttaka.

## Trimma vøddar og súkklur

Enn hava teir ikki luttiki› í súkklukapping fyri børn, men í ár skal ta› vera. Seinastu dagarnar upp undir Eystanstevnu ætla›u teir sær at venja hart. Longsti túrur, Brian hevur veri› á súkklu sínari, einari væl tilkoyrdari Empire XT Golden vi› átjan kervum, er úr Saltangará og inn á Strendur. Símun Jóhann hevur veri› heilt í Lamba vi› sínari Esperia Nedved, somulei›is vi› átjan kervum.

Eins og beinvøddarnir á dreingjunum, skulu súkklurnar eisini trimmast til kappingina. Fari› ver›ur hegnisliga til verka vi› bust og sterkum lúti, tí súkklan skal skína.

## Rópa á bá›ar

Kappingin fyri børn ver›ur leygarkvøldi› eftir Grand Prix súkklukappingina, sum byrjar vi› Eysturoyar Heilsølu klokkan 18.

Fyrimyndin hjá ungu dreingjunum eitur Pól Didrikssen og er sjálvandi eysturoyingur og í›in súkklari.

Spurdir, hvør fer vi› gullinum eft-ir loknan leik, svara teir í ein munn:

- EG...!

Floks- og skúlafelagar, sum fara at rópa og eggja undir kappingini, velja hvørgan framm um hin. Tey fara at rópa á bá›ar garparnar í fimta flokki.

Mynd: Jens Kristian Vang


*Brian Jacobsen (vm) og Símun Jóhann Samuelsen (hm) ver›a væl stu›la›ir av feløgum í Glyvra Skúla, tá i› teir fara at súkkla kapp leygarkvøldi›*

## Møti› á keiini!

Børn, i› ætla sær at luttaka í spennandi súkklukappingini, skulu bo›a frá luttøku á keiøkinum í Runavík um sekstí›ina leygarkvøldi›. Aldursbólkar og teinar eru ymiskir. Súkkla› ver›ur kring timburhandilin.

Ta› er súkklufelagi› í Havn, sum skipar fyri kappingunum.

# Leggja dent á pitsa

*SØLA. Tey í Kiosk Vár í Saltangará fara at leggja seg eftir at selja flógvan mat til brásvangar stevnugestir*

Høgni Mohr

Fast food til fastandi stevnugestir. Hetta tykist vera loysunaror›i› hjá eigaranum í Kiosk Vár, Hans Peturi Ellingsgaard. Kioskin hjá Hans Peturi fer nevniliga at leggja dent á at selja flógvan mat me›an stevna er.

Umframt hampuliga stórt úrval av vanligum kioskvørum, hevur Kiosk Vár pitsa, franskan hotdog, snerkt brey› og stoktar pylsur.

Stevnugestir, sum ver›a nívdir at brásvongd, kunnu støkka inn á gólvi› at metta seg í stundini, tí maturin ver›ur hildin heitur alla tí›ina.

Eini tíggju fólk fara at arbei›a í Kiosk Vár um Eystanstevnuna. Tá i› har›ast leikar á, ver›a tr‡ fólk til arbei›is.

Mynd: Jens Kristian Vang


*Hans Petur Ellingsgaard, sum eigur Kiosk Vár, fer at leggja dent á at selja pitsa og a›rar heitar rættir stevnudagarnar*



***Anna Højgaard og Boði Haraldson:***
*"Vit gleða okkum at seta føtur undir egið borð. Tá vit skuldu byggja, tóku vit lán í Føroya Banka. Vit hava fingið eina góða ráðgeving, soleiðis at vit ikki sita fyri meira, enn vit klára, og ikki koma illa fyri av óvæntaðum útreiðslum."*



petur & petur • 320870

"Tað ræður um at velja rætt
- tí valdu vit Føroya Banka"

**Visti tú,** at um tú ert viðskiftafólk hjá Føroya Banka, so hevur tú tín egna persónliga ráðgeva?

Hann ráðgevur um øll tíni fíggjarligu viðurskifti, serliga tá tað snýr seg um sethúsafígging, lán við trygging, samlagstrygging, sethúsa- og familjutrygging og biltrygging.

Hetta hevur bankin gjørt fyri at laga virksemið eftir tínum tørvi. Bankin setur seg inn í tína støðu, soleiðis at tín gerandisdagur kann gerast lættari, betri og bíligari.

Ætlar tú at seta búgv ella hevur sett búgv og ætlar at umbyggja, er Føroya Banki rætti bankin at tosa við.

Føroya Banki kann bjóða tær dygdartænastur fyri kappingarførar prísir.

FØROYA BANKI

STEVNUTILBOÐ

| Matador Mix Stjerne Mix Mammut 1 ps. 19,95 | 1 Coca Cola 0,5 ltr. 1 fr. Hot Dog 20,00 | Jolly 1,5 ltr. 9,95 + pant |
|---|---|---|

Eisini hava vit pylsur, toast og pizza.

Minst til okkara nýggja soft ice við ymiskum smakkum.

Nýbakað morgunbreyð verður selt hvønn sunnudag.

Tilboðini eru galdandi frá fríggjadegi 16. juni til sunnudag 18. juni.

Opið er:
Hvønn dag frá kl. 09.00-23.00
tó sunnudag frá kl. 08.00

KIOSK Vár TEL. 44 83 92 FAX 44 86 35 SALTANGARÁ

VÆLKOMIN Á EYSTANSTEVNU

Sosialurin - 311820

STEVNU-TILBOÐ

NÝTT TIL EYSTANSTEVNU

Ymiskar troyggjur og niðurdeilar
÷50%



SHOP-INN
Glyvrar • Tel. 44 72 60

Sosialurin - 311820